# Brandur givið fløgu út í Danmark

**Mánadagin kom nýggja fløgan við Brandi Enni út í Danmark, og nú verður nógv lagt fyri í royndini at gera føroyskan unglingin kendan uttanlands**



*Brandur Enni er nógv framm í donsku miðlunum í hesum døgum. Hósmorgunin verður hann við í morgunsendingini hjá TV 2, og síðst í vikuni fer hann at spæla á nøkrum av stóru keypsskálunum kring Danmark*

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Hesa vikuna verður Brandur Enni nógv frammi í Danmark, og fólkini, sum standa aftan fyri føroysku poppstjørnuna, vóna, at tað fer at leggja grundlagið undir einum veruligum gjøgnumbroti uttanlands.

Sunnudagin var Brandur við í barnasendingini hjá Bubber, sum er sera væl umtókt millum børn og teir yngstu tannáringarnar. Mánadagin fór nýggja fløgan, sum er kallað upp eftir Brandi sjálvum, út í sølubúðirnar, og í gjár var stórt útgávuhald í Palads miðskeiðis í danska høvuðsstaðnum.

## Dreymalið gjørt tónleikin

Tað verður gjørt nógv burtur úr útgávuni hjá Brandi, og tað verður væntandi lønt aftur við nógvari umrøðu av føroyska sangaranum.

Hósmorgunin verður Brandur við í morgunsendingini hjá TV 2 og síðst í vikuni fer hann at spæla á nøkrum av stóru keypsskálunum kring Danmark.

Á fløguni, sum nú er komin út, eru lutvíst nýggir sangir og lutvíst sangir, sum føroyingar kenna frá føroysku útgávuni hjá Brandi. Allir sangirnir eru á enskum máli.

Tað eru fremstu føroysku tónleikaframleiðararnir og tónleikararnir, sum hava staðið fyri arbeiðnum við tónleikinum á fløguni – tað ber til at kalla tað eitt slag av føroyskum dreymaliði – og nýggja føroyska plátufelagið, NAME, gevur fløguna út í Danmark.


Jomfrútilboð við nýggju Norrönu
Sigl til Danmarkar við gomlu Norrönu og heim við nýggju Norrönu

| Bilpakkar Tórshavn - Hanstholm 03.04. Lübeck - Føroyar 08.04. | 4-koyggjuk. v. wc/bað innv. á gomlu Norrönu/ 4-koyggjuk. v. wc/bað innv. á nýggju Norrönu | 4-koyggjuk. v. wc/bað innv. á gomlu Norrönu/ 4-koyggjuk. v. wc/bað útv. á nýggju Norrönu | 2-koyggjukamar v. wc/bað |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 fólk | 12.000 | 14.400 | 26.880 |
| Bilur + 3 fólk | 9.440 | 11.320 | 20.160 |
| Bilur + 2 fólk | 6.860 | 8.240 | 14.300 |
| Bilur + 1 fólk | 4.160 | 5.000 | 7.880 |

Bussferð í sambandi við Jomfrútúrin
Fráferð av Havnini við gomlu Norrönu 03. apríl kl. 22.00 og heimferð við nýggju Norrönu 08. apríl kl. 10.00. Eftir komu til Hanstholm verður koyrt beinleiðis til Hotel Hanstholm har gist verður fyrstu náttina. Um kvøldið døgurði á hotellinum. Sunnumorgunin 06. apríl verður koyrt suðuryvir til Lübeck har gist verður mánanáttina á hotelli. Mánadagin verða útferðir gjørdar í Lübeck.
Kl. 17.00 sleppa tey ferðandi umborð á Norrönu og gist verður í 4-koyggjukømrum við wc/bað innv.

Íroknað prísin er:
Úr bara 4.165,-
Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4-koyggjukømrum við wc/bað innv. Hartil uppihald á hotelli í dupultkømrum við wc/bað. Á hotellunum íroknað ½ vistarhald. Hartil er danskur luksusbussur og ferðaleiðari við á allari ferðini. Eykaprísur fyri betri kømur.

Eisini verður skipað fyri framsýningartúrum til Hetlands og Íslands og ferðaskráin fyri hesar verður hendan:

Framsýningartúrur Hetland
(skipið liggur nátt í Lerwick)

| Havn | Dagur | Koma | Fráferð |
|---|---|---|---|
| Tórshavn | 14.04 | - | 23.50 |
| Lerwick | 15.04 | 14.00 | - |
| Lerwick | 16.04 | - | 18.00 |
| Tórshavn | 17.04 | 10.00 | - |

Framsýningartúrur Ísland
(skipið liggur nátt á Seyðisfirði)

| Havn | Dagur | Koma | Fráferð |
|---|---|---|---|
| Tórshavn | 21.04 | - | 16.00 |
| Seyðisfjørður | 22.04 | 10.00 | - |
| Seyðisfjørður | 23.04 | - | 17.00 |
| Tórshavn | 24.04 | 12.00 | - |

| Ferðaseðlakostnaðurin fyri hvønn er: | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. | Bilar max. 5m |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lübeck-Føroyar | 1.800 | 2.360 | 3.080 | 4.000 | 5.200 | 920 |
| Tórsh.-Lerwick-Tórsh. Tórsh.-Seyðisfj.-Tórsh. | 1.200 | 1.360 | 1.400 | 1.560 | 1.640 | |

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link
J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo




# Grundlóg í heimsins miðdepli



**Smátt er eisini gott. Politiskt kann okkara nærleiki verða grundarlag undir veruligum fólkaræði, har einstaki borgarin kennir, at hansara rødd verður hoyrd. Altjóða ráðstevnan í Norðurlandahúsinum er prógv um, at Føroyar ikki bara eru langt úti**

GRUNDLÓG
*Ingi Rasmussen*

Um nøkur ár hava vit ikki bara hava tað elsta tingið í Norðurevropa. Tá eru vit eisini eru heimsins nýggjasta demokrati.

Við millum øðrum hesum orðum setti Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, Grundlógaráðstevnuna í Norðurlandahúsinum týsdagin.

Tríggir dagar eru settir av til ráðstevnuna, sum er í døgunum frá byrjaði týsdagin og endar hósdagin. Luttakararnir koma úr øllum heraðshornum úr heiminum, og tí er málið á stevnuni bæði føroyskt, norðurlendskt og enskt. Fleiri av fyrilestrarhaldarunum eru viðurkend og køn fólk úr altjóða umhvørvinum, sum hava royndir við grundlógararbeiði í teirra londum.

Í salinum í Norðurlandahúsinum sóust eisini nógv fólk, sum hava ávirkan og kunnleika í Føroyum. Tað vóru fyrst og fremst politikarar og fakfólk, sum lýddu á, men málið við ráðstevnuni er, at hon er fyrsta stigið í at gera grundlógartilgongdina fólksliga.

## Far out

Tað var Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, sum setti ráðstevnuna. Hann noyddist at skifta ímillum málsliga, tí fólk eru komin úr øllum heiminum. Yvir fyri ensku luttakarunum viðgekk hann, at Føroyar eru »far out«, sum skaldið tók til. Men samstundis minti hann á orðini hjá William Heinesen, at Føroyar eru ein miðdepil í heiminum.

– Tað er lætt at føra prógv fyri, at vit eru langt úti í Føroyum. Vit eru 47.000 fólk mitt í Norðuratlantshavinum, sum stríðast fyri sjálvstýri og smíða okkara egnu grundlóg. Men tað ber eisini til at tosa fyri, at vit í veruleikanum stríðast fyri at binda okkum í miðdeplin í alheiminum. At finna okkara egna pláss fyri at møta avbjóðingunum í globaliseringini uttan at missa okkara samleika, okkara mentan og uppruna. Vit síggja tað sum ein stóran framíhjárætt at fáa møguleikan at kjakast um, smíða og innføra okkara egnu grundlóg, segði Høgni Hoydal, leystliga umsettur úr enskum.

Hann vísti á møguleikan hjá føroyingum at finna og lýsa okkara felags støði. Okkara rættindi og skyldur. Sambandið millum stat og borgara. Eftirmeta okkara lógarsiðvenju. Og í einari grundlóg kunnu vit eisini staðfesta rættindini til náttúrutilfeingið, okkara tilveru- og rávørugrundarlag.

## Smátt er gott

Landsstýrismaðurin steðgaði eitt sindur á við hetta at vera eitt lítið land í einum stórum heimi.

– Smá lond verða ofta lýst við avmarkingum, afturlætni og nærleikanum og teimum vantandi fyrimunum, sum hetta hevur við sær. Afturlætni kann skapa forðingar, men tað kann eisini vera ein styrki at vera eitt lítið land. Vit síggja heildina, og vit kunnu síggja avleiðingarnar av okkara gerðum, segði Høgni Hoydal.

Málið við grundlógarráðstevnuni er at læra av umheiminum, tá lítla landið skal finna sítt egna støði í heiminum.

– Politiskt kann okkara nærleiki verða grundarlag undir veruligum fólkaræði, har einstaki borgarin kennir, at hansara rødd verður hoyrd og telur. Men fyri at vit skulu fáa teir fyrimunir, sum eitt lítið land kann hava, krevst, at valdið er í hondunum á fólkinum. Og tað er málið við at skapa okkara egnu grundlóg. Og fyri at náa hagar, mugu vit læra av royndunum hjá restini av heiminum, segði Høgni Hoydal.

## Fólkslig tilgongd

Grundlógararbeiðið gongur nú á fjórða ári. Eitt nýtt lógaruppskot, sum Høgni Hoydal hevur lagt fyri tingið, skal aftur seta ferð á tað arbeiðið. Nógv er komið á skaftið, men stóra politiska viðgerðin av endaligum uppskotum er eftir, og enn er ikki eydnast at fáa eina fólksliga viðgerð, ið verður søgd at vera so alneyðug.

– Hendan ráðstevnan er ein liður í at fáa arbeiðið og spurningarnar út og knýta tey saman við royndum og avbjóðingum, sum onnur hava gjørt sær í altjóða samanhangi. Vit føroyingar hava ein framíhjárætt at byggja eina felags grund og fáa øll við í tað arbeiðið. Lat okkum brúka hann, segði Høgni Hoydal.

Ráðstevnan er fyrireikað av Grundlógarnevndini í tøttum samstarvi við Løgmálaráðið. Búmerkið fyri ráðstevnuni er ein vakur stavur úr Seyðabrævinum frá 1298. Nú góð 700 ár seinni verður ein nýggj føroysk grund prosjekterað í Norðurlandahúsinum.



*Ein stavur úr Seyðabrævinum er búmerki á ráðstevnuni. Á myndini: Ingi Højgaard, orðstýrari, og Jóan Pauli Joensen, formaður í Grundlógarnevndini.*

*Myndir: Jens K. Vang*

## Ráðstevna við stórum týdningi

**Nógv viðurskifti eru at taka upp í einari grundlógarráðstevnu, og vónin er, at ráðstevnan gevur frískan íblástur til víðari arbeiðið við føroyskari grundlóg, sigur formaðurin í Grundlógarnevndini**

GRUNDLÓG
*Ingi Rasmussen*

Ætlanin var, at lógin um grundlógarnevnd varð samykt í løgtinginum, áðrenn grundlógaráðstevnan fór av bakkastokki, so hon kundi verða ein virðilig byrjan á víðari grundlógararbeiðið. Men tað gongur helst rúm tíð enn, áðrenn lógin verður samtykt.

Stevnan er ikki minni viðkomandi fyri tað, helt formaðurin í Grundlógarnevndini fyri, tá hann sum tann fyrsti tók orðið klokkan 9.05 týsmorgunin og beyð luttakarunum vælkomnum til eina altjóða ráðstevnu um eina føroyska grundlóg.

– Grundlógarráðstevnan er av sera stórum týdningi fyri okkum. Tað eru nógvir spurningar at loysa, og hóast vit hava eitt tað elsta tingið í heiminum, so er nógv í okkara politisku siðvenju og í okkara politisku, almennu og mentanarligu virðum, sum eiga at verða tikin upp til orðaskifti í einari grundlógarráðstevnu. Alt í ráðstevnuni er viðkomandi, og tað er mín vón, at alt tilfarið frá hesari ráðstevnuni fer at geva frískan íblástur til tað komandi arbeiðið, sigur Jóan Pauli Joensen.